# NÝTT OG HEITT FRÁ POPPFRABRIKKINI

Gentubólkurin Pussycat Dolls er nú farin at gera um seg á hitlistum í Europa og USA. Bólkurin við teimum seks kvinnunum førir seg fram við stórum sjálvsáliti bæði í tónleiki og framførslum, og tað fangar ungfólk.
Pussycat Dolls var fyrstu ferð frammi í 1993, og skiftandi kvinnur hava verið við í bólkinum, sum leggur eins stóran dent á dans og framførslur sum tónleik. Nógvir kendir sangarar hava havt gestframførslur saman við bólkinum gjøgnum árini, og millum teirra teljast Britney Spears, Christina Aquilera og Gwen Stefani.
Í 2003 var manningin í Pussycat Dolls skift út, og upptøkuroyndir vóru hildnir til nýggja bólkin. Hetta endaði við, at seks nýggjar kvinnur komu upp í, og tær hava nú veruliga vind í seglunum.
Sangurin Don't Cha, har tær hava tónleikaliga vitjan av Busta Rhymes, stendur seg væl á hitlistum í USA og Europa, og í kjalarvørrinum av hesum kemur fyrsta veruliga fløgan hjá bólkinum, PCD.
Pussycat Dolls kunnu nú eisini upplivast á konsertum víðahvar, og tær skulu verða við til stóra MTV hátíðarhaldið í Portugal í næstum.



*Tær seks kvinnurnar í Pussycat Dolls eru valdar út eftir upptøkuroyndir við nógvum áhugaðum kvinnum*



*Fyrsta fløgan hjá Pussycat Dolls kallast PCD*

## HITLIST

### 15 tær bestu (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Finnur Páll | Herbergið |
| 2 | Pipar & Salt | Høm Høm |
| 3 | James Blunt | You're Beautiful |
| 4 | Nephew | Worst/Best Case Scenario |
| 5 | Kim Hansen | Maria |
| 6 | The Dreams | I'll Be There |
| 7 | Orkestriiið har vestriii | 1 Veit iii |
| 8 | Bon Jovi | Have a Nice Day |
| 9 | 200 | Mamma |
| 10 | Anna David | Fuck Dig |
| 11 | Daddy Yankee | Gasolina |
| 12 | The Rasmus | No Fear |
| 13 | t.A.T.u | All About Us |
| 14 | Rihanna | Pon De Replay |
| 15 | Sugababes | Push The Buttom |

### Tjeklisten (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Mew | The Zookeper´s Boy |
| 2 | Nephew | Byens Hotel |
| 3 | Depeche Mode | Precious |
| 4 | Robbie Williams | Tripping |
| 5 | Kashmir | The Curse of Being a Girl |
| 6 | Sugababes | Push The Buttom |
| 7 | James Blunt | You're Beautiful |
| 8 | Gavin DeGraw | Chariot |
| 9 | Pussycat Dolls | Don't Cha |
| 10 | L.O.C. | Frk. Escobar |
| 11 | Coldplay | Fix You |
| 12 | Cardigans | Cardigans |
| 13 | Gorillaz | Dare |
| 14 | Carpark North | Fireworks |
| 15 | Kaiser Chiefs | I Predict A Riot |
| 16 | U2 | All Because Of You |
| 17 | Anna David | Hvad Nu Hvis? |
| 18 | t.A.T.u. | All About Us |
| 19 | Kelly Clarkson | Behind These Hazel Eyes |
| 20 | Amy Diamond | What's In It For Me |

### Top of the Pops (BBC)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Arctic Monkeys | I Bet Your Look Good On The Dancefloor |
| 2 | Sugababes | Push The Button |
| 3 | McFly | I Wanna Hold You |
| 4 | Robbie Williams | Tripping |
| 5 | Pussycat Dolls ft. Busta Rhymes | Don't Cha |
| 6 | Kayne West ft. Jamie Foxx | Gold Digger |
| 7 | Friday Hill | Baby Goodbye |
| 8 | Daniel Powter | Bad Day |
| 9 | Sean Paul | We Be Burning |
| 10 | Liberty X | Song 4 Lovers |
| 11 | Dannii Minogue & Soul Seekerz | Perfection |
| 12 | Mariah Carey | Get Your Number/Shake It Off |
| 13 | Love Bites | You Broke My Heart |
| 14 | Bob Sinclair ft. Gary Nesta Pine | Love Generation |
| 15 | Mylo vs. Miami Sound Machine | Doctor Pressure |
| 16 | Gorillaz | Dare |
| 17 | Katie Melua | Nine Million Bicycles |
| 18 | Kelly Clarkson | Behind These Hazel Eyes |
| 19 | U2 | Al Because Of You |
| 20 | Lee Ryan | Turn Your Car Around |

### Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kayne West ft. Jamie Foxx | Gold Digger |
| 2 | Chris Brown | Run It |
| 3 | Nickelback | Photograph |
| 4 | The Black Eyed Peas | My Humps |
| 5 | Mariah Carey | Shake It Off |
| 6 | Bow Wow ft. Ciara | Like You |
| 7 | Young Jeezy ft. Akon | Soul Survivor |
| 8 | Green Day | Wake Me Up When September Ends |
| 9 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 10 | Fall Out Boy | Sugar, We're Goin' Down |
| 11 | David Banner | Play |
| 12 | Pretty Ricky | Your Body |
| 13 | Sean Paul | We Be Burnin' |
| 14 | Weezer | Beverly Hills |
| 15 | Mariah Carey | We Belong Together |
| 16 | Lifehouse | You And Me |
| 17 | Twista ft. Trey Songz | Girl Tonite |
| 18 | T-Pain | I'm Sprung |
| 19 | The Pussycat Dolls | Don't Cha |
| 20 | Gorillaz | Feel Good Inc. |



## PARIS LIVIR LÍVIÐ

Tann nógv umtalaða Paris Hilton hevur ikki sitið heima og kúrt, síðani forlovilsið við ríkmannin Paris Latsis varð liðugt herfyri. Litaðu bløðini fylgja við hvørjum fótafetið hjá vøkrum amerikansku kvinnunu, ið er mest kend fyri at vera kend, og nú skriva tey um, at hon hevur fjasast við í øllum førum tveir mans seinastu tíðina. Í løtuni skal Paris Hilton halda saman við Brandon Davis, men herfyri skuldi hon hava fjasast við einum Stavros Niarchos. Í øllum førum er lívliga Paris aftur á ferð í náttarlívinum, og tað plagar at vera gott tilfar hjá slaturspressuni.

(Mynd: Scanpix)

## *GRAND PRIXIÐ* FEKK SÍTT WATERLOO



Sangurin Waterloo hjá Abba varð um vikuskiftið valdur til besta sangin í Eurovison – Grand Prixnum – nakrantið. Sangurin var saman við fleiri øðrum hittum tilnevndur í kappingini, sum var í Keypmannahavn í sambandi við 50 ára hátíðarhaldið hjá Grand Prixnum. Hinir sangirnir kláraðu seg ikki í kappingini, tí Abba var tryggur vinnari við teirra Waterloo. Eingin av fyrrverandi limunum í svenska poppbólkinum kundi verða til staðar at taka ímóti heiðurinum, men sangurin hjá Abba frá 1974 varð vístur á stórskiggja í Forum og varpaður út til teir 100 milliónir hyggjararnar í 31 londum, sum hugdu eftir tiltakinum.

(Mynd: Scanpix)



## HERBERGIÐ *ovast á 15 teimum bestu*

Hesa vikuna er sangurin hjá Páll Finnur Páll um Herbergið ovast á 15 teimum bestu. Sangurin hevur ríkið Høm Høm hjá Pipar & Salt av fremsta plássinum
Páll Finnur Páll hava verið í sjey vikur inn á 15 teimum bestu við sanginum um Herbergið, og eftir at hava ligið upp í móti sjálvum toppinum í nakrar vikur er sangurin nú ovast á listanum.
Pipar & Salt, sum hava ligið ovast við Høm Høm í nakrar vikur, eru hesa vikuna næstovast. Fýra aðrir føroyskir sangir eru í løtuni inni á listanum, og hesa vikuna hevur bólkurin Paradox eitt eykalag við á listanum.